## Dagsskrá og fundarfrásøgn frá skúlastýrisfundi í skúlanum á Argjahamri

| Dagur: 25.februar 2019<br>Tíð:kl 16.00 – 18.00 | Luttakarar: Allan, Vivian, Jóhan, Súsanna, Bjørghild og Marjun<br><br>Ikki møtt: Bergun |
|---|---|

| **Dagsskrá** | | **Frásøgn**<br>*Samandráttur av kunningini/umrøðuni, niðurstøða/avgerð, ásetan av ábyrgdarhava og møgulig freist.* | **Miðlan** |
|---|---|---|---|
| 1. | Undirskriving av fundarfrásøgn (gerðabók) frá seinasta fundi | | AM |
| 2. | Økið framman fyri høvuðsdyrnar, uppskot til hoyringar | Uppskotið frá Teknisku deild er at fýra gummi pullartar eru settir at forða, hvørju megin eina innkoyring inn á økið framman fyri høvuðsdyrnar. Eitt skelti skal setast upp, sum boðar frá at forboð er at koyra inn á økið. Tó er tað undantikið akførum, sum skulu við vøru o.ø. ella um rørslutarnaði skulu inn í skúlan.<br>Samt skúlastýri tók undir við at fáa hetta uppskot sett í verk. | MH |
| 3. | Høvuðsdyrnar og móttøkuøkið | Uppskotið er at keypa størri máttu, framman fyri durin.Sagt bleiv at trappurnar altíð eru vátar, tá ið fólk koma at avheinta síni børn um fýra tíðina.<br>Spurningurin er um vaskingin kann flytast. Sum er hevur skúlin vaskingina um hendi, tí skal hon avgreiðast fyri kl 17.00.<br>Foreldraumboðini, bóru boðini at lærarnir ikki virka sum fyrimyndir við at lata seg úr skónum.Tað er ringt hjá øðrum vaksnum og børnum at fylgja eftir teimumm reglum sum lærarar ikki sjálvir halda.<br>Spurt verður, hví dyrnar eru stongdar um kvøldarnar, tí tað førir við sær, at ein skógvur verður lagdur ímillum í hurðunum, so hurðin stendur opin og kølir allan bygningin niður alt kvøldið<br>Hallarumsitingin umsitir skúlan eftir kl 16.00 og teir hava við hurðar og vasking at gera eftir tað, soleiðis er tað býtið millum skúla og høllina. | AM |
| 4. | Fíggjarárið 2019 | Samlaða játtanin til skúlan er góðar 4.mill<br>Játtanin til undirvísingartilfar 849.000 kr<br>Henda kontan er ógvuliga tepur nú, tí nógv undirvírvísingartilfar er einnýtis bøkur, sum eru kostnaðarmikið. | MH |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | Vit standa uttan iva á einum vegamóti millum pappír og teldutøkt tilfar, tí skal gjaldast til báðar ”pallar”<br>Fíggjarviðurskiftini millum allar stovnarnar í húsinum eru enn ikki avgreiddir, hetta tyngir fíggjarorkuna hjá skúlanum. Orsøkin er at lyklatølini eru sera ógreið. | |
| 5. | Garðvaktarskipanin í fríkorterinum | | Tað eru ov fáar garðvaktir ella tær eru ringar hjá næmingunum at fáa eyga á. Ofta standa garðvaktir-nar saman og tosa, ístaðin fyri at verða runt í garði-num so børnini kunnu síggja tær. Garvaktirnar eru ofta ringar at síggja, tí er ynskiligt at tær vóru í ve-stum ella onkrum so tær vóru meira sjónligar.<br><br>MH skal taka hetta mál upp við lærarnar og at vestra verða tøkir hjá lærarum. | AM |
| 6. | Happing fyri kl 8.00 í 1.fl. | | Ynski er at lærarar taka ímóti næmingum áðrenn kl 8.00 í fyrsta flokki.<br>Hóast fólk er á deildini kl 7.30, so er tað ikki nóg mikið at forða fyri happing, sum fer fram, áðrenn skúlatíðin byrjar.<br>Hetta skal inn í virksemisætlanina hjá lærarnum og kann tí byrja til komandi skúlaár, at ein lærari tekur ímóti fyrst á morgni. | AM |
| 7. | Komandi 7.flokkur. | | Næmingatalið er niðri á 29. næmg, sum er ov nógv men ov lítið fyri tveir flokkar. Ætlanin er at halda tað sum ein flokk við í mesta muni tveimum læra-rum. | MH |
| 8. | Kunning | | Broytingar í fólkaskúlalógini sum skulu leggjast fram í Tinginum<br>Broytingar í tímatalinum eru skerjingar við 2 tímum á hvørjum floksstigi.<br>Eina viku minni skúlagongd, so at skúladagatalið hjá næmingum kemur niður á 193 dagar og lærarar framhaldandi hava 198 dagar, | MH |
| 9. | Ymiskt | | | |